FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

Kommunufelagið

Dagfesting: 14.03.2023

J.nr. 23/00146-4

Skrivað hevur: Jóanis Erik Køtlum

Hoyringsskriv til uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðugjøld fyri fiskiskap (veiðigjaldslógin)

Fuglafjarðar kommuna hevur gjøgnumgingið skjølini, ið hoyra til omanfyrinevnda uppskot. Yvirskipað sæð, er Fuglafjarðar kommununa av tí fatan, at inntrivið, sum landsstýrið ætlar at gera, í sonevndu endurskoðanini av tilfeingisgjøldum í uppisjóvarvinnuni og tí partinum av flotanum, sum gagnnýtir Barentshavið, er ógvuliga umfatandi og rakar ávísar partar av landinum sera meint. Fuglafjarðar kommuna er tískil ikki samd við metingini hjá Fíggjarmálaráðnum, tá ført verður fram, at lógaruppskotið ikki hevur serliga avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Fuglafjarðar kommuna hevur tó ikki ítøkiligar viðmerkingar til ávísar partar av broytingaruppskotinum – eitt nú um munur skal gerast ella ikki, á várgýtandi sild og norðhavssild.

Inntøkugrundarlagið hjá Fuglafjarðar kommunu er nógv knýtt at virkseminum sum reiðaríir útinna, bæði tey sum eru skrásett í kommununi og tey, ið eru heimahoyrandi aðrastaðni. Hetta snýr seg bæði um vanligan inntøkuskatt og partafelagsskatt.

Fuglafjarðar kommuna hevur gjørt eina meting av hvørja ávirkan veiðugjøldini fara at hava á inntøkurnar hjá Fuglafjarðar kommunu, út frá tølum vit hava fingið frá lokalum reiðaríið, sum hevur uppísjóvarvirksemi og virksemi í Barentshavinum. Tá er ikki tikið hædd fyri sjófólki í Fuglafjarðar kommunu, sum sigla við reiðaríum skrásett í øðrum kommununum.

Metingin er, at fyri uppisjóvarflotan, merkja øktu veiðugjøldini ein lægri kommunuskatt á DKK 1.600.000,- umframt DKK 580.000 minni í partafelagsskatti.

Fyri Barentshavsflotan merkja øktu veiðugjøldini DKK 423.000 í lægri skattainntøku, eins og partafelagsskatturin kann væntast at verða DKK 238.000 lægr -hetta er bara fyri Fuglafjarðar kommunu.

Tá er fortreytin, at sama nøgd og sami prísur verða í 2023, sum í 2022.

Sostatt verður beinleiðis ávirkanin á Fuglafjarðar kommunu, at skattskylduga inntøkan lækkar við DKK 2.023.000 meðan partafelagsskatturin lækkar við DKK 818.000.

Sostatt tykist tað, at við uppskotinum sum Føroya Landsstýri kemur við, missur Fuglafjarðar kommuna beinleiðis DKK 2.841.000.

Tá eru avleiddar vinnur ikki taldar við.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í stað 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

Sambært fíggjarætlanini hjá Fuglafjarðar kommunu fyri fíggjarárið 2023, er væntaða nettoskattainntøkan DKK 71.421.902. Lækkingin í inntøkuskattinum orsaka av broyttu veiðugjøldunum er sostatt knøpp 3%.

Sambært somu fíggjarætlan, er partafelagsskatturin mettur til DKK 13.500.000. Roknaða inntøku lækkingin orsaka av broyttu veiðugjøldum er áleið 6 %

Fuglafjarðar kommuna mælir kommunufelagnum til staðiliga at heita á Føroya Landsstýrið, um ikki at gjøgnumføra tílíkar broytingar í einum høggið uttan so, at kommunurnar, sum eru fyri missi, fáa endugjald fyri hendan inntøkumiss.

Dávur Juul, borgarstjóri

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í stød 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo